**LANDFOGEDEN PÅ FÆRØERNE**
**POLITIMESTEREN**
Yviri við Strond 17 - Postboks 3018 LMH002
FO-110 Tórshavn
Telefon (+298) 351448 - Telefax (+298) 351452

**Borgmester Kristin Michelsen**
Tvøroyrar Kommuna
Postboks 80, 800 Tvøroyri

**Vedrørende samarbejdsaftale med Tvøroyri kommune om optagelse af dyr.**

Med henvisning til Tvøroyri kommunes skrivelse af 16. november 2015 fremsendes herved kopi af den originale aftale mellem Landfogeden og kommunen, som den 16. december 2016 blev underskrevet af chefpolitiinspektør Niels Erik Nymark Jensen.

Den originale aftale vil blive opbevaret på embedets sag under ovenstående journalnummer.

Med hensyn til den praktiske gennemførsel af aftalen, bedes De venligst kontakte distriktsleder Jaspur Vang, der på Landfogedens vegne vil varetage opgaven.

---

Samstarvsavtala millum Politimeistaran í Føroyum og Tvøroyrar Kommunu um upptøku av leysum hundum og øðrum djórum í Tvøroyrar Kommunu, tó í markatalsbygdini Øravík bert um upptøku av Ieysgangandi hundum.

Við heimild i løgtingslóg nr. 82 frá 19. juni 1993 um hundar 3, stk. 2, lóg nr. 171 frá 18. mai 1937 fyri Føroyar um "hegn- og markfred" kap. 5, og rættargangslógini, er gjørd hendan samstarvsavtala um upptøku av leysum hundum og øðrum djórum, umframt annað arbeiði.

**HUNDAR**
Fráboðan um, at hundur gongur leysur á gøtu, vegi, breyt ella økið sum er opin fyri vanligari ferðslu, verður Latin løgregluni, sum gevur boðini víðari til aktingarmannin, sum Tvøroyrar Kommuna hevur sett. Aktingarmaðurin tekur hundin upp og boðar Løgreglustøðini Tvøroyri frá upptøkuni á serstøkum skjali.

Er uppgávan ov stór ella ov torfør fyri aktingarmannin einsamallan, kann løgreglan veita honum hjálp.

Hevur upptikin hundur spjaldur, so sum ásett er í lógini, boðsendir løgreglan eigaranum. Hevur eigarin ikki innan tríggjar ferðir 24 tímar, eftir at boðað er frá, rinda tey gjøld, sum staðist hava av upptøkuni, verður hundurin avlívaður.
Hevur upptikin hundur ikki helsi ella spjaldur, lýsir aktingamaðurin eftir eigaranum i kunngerðanalvunum. Løgreglan ger standardskriv til at nýta til kunngerðatalvurnar. Hevur eigarin ikki innan tríggjar ferðir 24 tímar, frá ti boðað er frá ella lýst er í kunngerðartalvunum í Froðba, Trongisvági, Øravík og á Tvøroyri, loyst hundin móti at rinda tey gjøld, sum staðist hava av upptøkuni, kann løgreglan avhenda ella avlíva hundin.

**ONNUR DJÓR**
Fráboðan um seyð, ross, gæs, dunnur, høsn og onnur djór, sum løgreglan skal taka sær av sambært § 36 í løgtingslóg um"hegn- og markfred" og sambært rættargangslógina, verður latin løgregluni, sum gevur boðini víðari til aktingarmannin, sum Tvøroyrar Kommuna hevur sett. Aktingarmaðurin tekur djóri upp og boðar Løgreglustøðini á Tvøroyri frá upptøkuni á serstøkum skjali.
Hvat markatalsbygdini Øravík viðvíkur, fevnir hendan avtalan bert um hundar.

**VARDVEITSLUSTADUR**
Tvøroyrar Kommuna hevur útvegað eitt øki og hølir, ið eru hóskandi til upptikin djór.
Áðrenn hølini takast í nýtslu, skulu loyvi, ið kunnu vera kravd sambært aðrari lóggávu m,a. frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og Landsdjóralæknanum v.m. vera innheintaði. Tvøroyrar Kommuna hevur ábyrgdina av at fáa hesi loyvi vega
Løgreglan setir skelti upp, so borgarin veit, at økið er undir løgregluni.
Tvøroyrar Kommuna ber allar útreiðslurnar av varðveitslustaðnum.
Aktingarmaðurin ansar upptiknum djórunum og fóðrar hesi.
Seyður og stórdýr, sum t.d. ross, kunnu vera havd uttandura.

**GJØLD**
Hundar:
Fast gjald fyri upptøku 300,-kr.
Vistarhald fyri hvørt nýkomið samdøgur hundurin er í varðveitslu 125,-kr.

Kettur, kaninir, gæs, dunnur, høsn og onnur smádjór:
Fast gjald fyri upptøku 125,-kr.
Vistarhald fyri hvørt nýkomið samdøgur djóri er í varðveitslu 35,- kr.

**Seyður:**
Fast gjald fyri upptøku 125,-kr.
Vistarhald pr. samdøgur hvørt nýkomið samdøgur tey fyrstu 6 samdøgrini 60,- kr.
Vistarhald fyri hvørt nýkomið samdøgur síðani 35,- kr.

Ross og onnur stórdjór:
Fast gjald fyri upptøku 600,- kr.
Fyri hvørt nýkomið samdøgur djórið er í varðveitslu (uttandura) 125,-kr.

Aktingarmaðurin og løgreglan taka støðu til gjaldið, um ivamál eru, t.d... viðvíkjandi tali av djórum, aldri á hesum ella varðveitslutíð.

**LOYSING/AVROKNING**
Áðrenn djór ella hundur verða útflýggjað eigara, skal løgreglan krevja eigaran eftir kostnaði fyri upptøkuna og kostnaði fyri møkugulligt vistarhald.
Útflýggjan av upptiknum djórum fer fram á varðveitingarstaðnum.
Aktingarmaðurin útflýggjar djórini eftir nærri boðum frá løgregluni
Eigarin fær ikki djórið útflýggjað, uttan at viðkomandi i vanligu upplatingartíðini hjá Løgregluni hevur verið á løgreglustøðini og avroknað fyri djóri.
Um djóri ikki verður avheintað so sum avtalað er, hevur Aktingarmaðurin ikki skyldu at útflýggja djóri, men hevur eigarin tá skyldu at gjalda meirkostnað og gera nýggja avtalu við løgregluna um útflýggjan.
Skal djóri útflýggjast annað tíðarskeið, enn avtalað er, rindar eigarin fyri ómakin.
Løgreglan avroknar einaferð um mánaðan við Tvøroyrar Kommunu.

**AVLÍVING/AVHENDING**
Hevur eigarin ikki Loyst djóri móti at rinda kostnaðin, avhendar ella avlívar løgreglan djóri.
Løgreglan stendur fyri avlívingini, Løgregluni stendur tó fritt at gera avtalu við aktingarmannin um at viðvirka i samband við avlíving, burturbeining v.m..

**AÐRAR ÁSETINGAR**
Løgreglan hevur yvirlit yvir upptikin djór.
Boð til ella frá aktingarmanninum verda i vanligari upplatingartíðini givin til løgreglustøðina á Tvøroyri, og til vakthavandi á Løgreglustøðin í Tórshavn uttan fyri vanliga upplatingartíð.

Aktingarskipanin virkar alt samdøgrið.

Tá ið løgreglan biður aktingamannin um hjálp til arbeiði, ið tað sum so áleggur løgregluni at gera, t.d.. sambært §36 i løgtingslóg m. 171 frá 18. mai 1937 fyri Føroyar um"hegn og markfred", sum m.a. ásetur, at "er husdyr indsat og dets ejer ikke kendes, kan det overleveres til politiet, som har at tage sig af det", verður arbeiðið gjørt eftir rokning. Um løgreglan biður aktingarmannin um hjálp til annað arbeiði eitt nú til avlíving av djórum í samband við óhapp, verður arbeiðið somuleiðis gjørt eftir rokning.

Tvøroyrar Kommuna hevur alla ábyrgd av at halda bøgarð millum inn- og útmark i markatalsbygdunum Froðba og Trongisvágur alt árið. Um so er, at seyður úr høgunum i nevndu markatalsbygdum kemur i bøin av teirri orsøk, at nevndi bøgarður ikki er hildin, ber Tvøroyrar Kommuna kostnaðin av upptøkuni.

Samstarvsavtalan kann sigast upp av báðum pørtum og er uppsagnarfreistin 3 mánaðir frá tí l. í fylgjandi mánaði at rokna.

Hendan samstarvsavtala fær gildi 1. januar 2016

**Tvøroyrar Kommunu**
**Føroya Landfúti**